**FILMUR IN ABSENTIA. Í tveimum greinum fer Meinhard Jensen úr Gøtu at draga fram eitt úrval av nýggjum filmum, sum hóast týdningarmiklir í altjóða filmslist, ikki funnu vegin higar í undanfarna ári. Í hesi fyrru greinini viðger Meinhard filmar hjá brøðrunum Cohen og Wim Wenders. Í seinnu greinini verða filmarnir "Sweet and lowdown" hjá Woody Allen og "Wonderboys" hjá Curtis Hanson viðgjørdir**



*Meinhard Jensen filmsummælari vil hava altjóða viðurkendar filmar sýndar í føroyskum biohallum*

# Odysseuskvæðið undir depressiónini

## - Coen brøðurnir aftur

*Meinhard Jensen*

Joel og Ethan Coen eru brøður og hava gjørt film saman síðan í áttatiárunum. Kendast eru "Fargo" og "The Big Lebowski". Nýggi filmurin eitur "O Brother, Where Art Thou?"

Tað stendur í byrjanini á O Brother, Where Art Thou?, at filmurin er bygdur á Odysseuskvæðið hjá Homeros. Tað varð skrivað fyri knøppum 3000 árum síðan og er ein høvuðstuðul undir europeiska hetjukvæðinum og vesturlendskum bókmentum. Evnið er heimferð Odysseusar eftir bardaga í Troja. Hann skal heim at vinna valdið og konu sína, Penelopu, aftur. Tað eydnast, men nógv strev og mótgangur koma honum í vegin fyrst.

### Søgan

Odysseus eitur Ulysses á enskum, og tað er eisini navnið hjá høvuðspersóninum í "O Brother, Where Art Thou?", sum er spældur av George Clooney. Hann og vinmenninir Pete og Delmar (Tim Blake Nelson og John Turturro) flýggja úr fangahúsi og byrja soleiðis ferð sína í strípututm klæðum við leinkjum um beinini.

Ulysses hevur sagt vinum sínum, at teir skulu fáa part í einum stórum skatti, sum hann hevur grivið niður. Við byrjanina av ferðini møta teir einum blindum síggjara, sum sigur Ulysses, at hann fer at finna ein skatt, men tað verður gjøgnum mikið stríð og nógvan mótgang. Blindi síggjarin er tikin úr grikska skaldarheiminum, men her er hann settur inn í ein suðurstatssamanhang, tá modernaði tónleikurin lá í vøgguni, tó kanska búnari enn í dag á mongum økjum, og amerikanska tjóðin baksaðist við búskaparliga depressión.

### Heitið

Heitið á filminum ljóðar sum róp frá einum øvutum Káin kompleksi. Tað er tikið úr "Sullivan's Travels" hjá Preston Sturge, har tað var ein skemtifilmsleikstjóri, sum vildi sleppa at gera ein álvarsligan film, sum skuldi eita O Brother, Where Art Thou?, men hann doyði áðrenn. Nú hava Coen brøðurnir nýtt heitið, til eina søgu, sum fyrst og fremst er vøkur og stuttlig við álvarsomum undirtónum.

### Dámur

Tað er týðiligt, at Coen brøðurnir hava roynt at funnið so nógv element, sum til ber, fyri at endurskapa suðurstatirnar frá tríatiárunum. Men samstundis er filmurin tónleikasøga, ein griksk mýta og ein stuttligur filmur. Ein hending kann lýsa dámin, sum er samansettur av tí mytologiska og tí amerikanska. Ulysses, Delmar og Pete eru hálvgun vilstir í einum skógi og hoyra mitt í øllum sang. Sangurin er yndisligur spiritual, og hann kemur frá einum fylgi, sum er á veg gjøgnum skógin oman til ánna. Hetta er tað mytukenda, sum næstan kundi verið í Grikkalandi fyri 3000 árum síðan. Men sangararnir eru amerikufólk, helst babtistar, á veg oman til dóp. Hetta er so amerikanskt, sum Homer er grikskur.

Kykloparnir í Odysseuskvæðinum eru myndaðir í John Goodman, sum er ein einoygdur bíbliuseljari. Hann umboðar pengahungrandi partin av tí kristna Amerika. Men tá vit hoyra andaliga tónleikin, gloyma vit einstøku persónarnar og hendingarnar. Hetta fær eina listarliga dýpd, sum dregur alt hitt upp við sær, tá Ulysses einaferð móti endanum fer á knøini og biður Gud um eitt undur, og vatnið kemur – henda gamla myndin upp á lív okkara og gerningar Guds, bæði fruktbæri og oyðing.

Aðrar hendingar eru, at teir møta einum maniodepressivum bankarænara, nøkrum hvíttklæddum Sírenum, sum syngja og vaska klæði í ánni, og fara á Ku Klux Klan fund. Við ein krossveg hitta teir ein svartan bluesguitarspælara, sum hevur selt sálina til Djevulin.

### Tónleikurin

Coen brøðurnir hava sagt, at tónleikurin var valdur, áðrenn handritið varð skrivað, og tað er trúligt. Tónleikur og filmur hava altíð verið par, men stundum er tónleikurin meira berandi enn annars. "Pulp Fiction", "Godfather III" og óteljandi musicals eru bara nøkur dømi.

Í O Brother, Where Art Thou er tónleikurin snildisliga samantvinnaður við søguna. Tað er blues, gospel, bluegrass og country, sett í sín rætta samanhang við pílagrímum, glataðum sálum, lógloysingum, profetum. Hóast filmurin er sjáldsama torførur at greina, so er hann ikki torgreiddur hóast alt. Hyggjarin fatar dýpdirnar í søguni og skilir, at tað snýr seg um amerikanska mentan, og at á øllum økjum er ónt og gott. Og hóast allan skilnað, so hevur tónleikurin dugað at skapa eitt sindur av einleika í mentanina.

Tónleikasíðuna hava Coen brøðurnir latið í góðar hendur. T-Bone Burnett stendur fyri henn.

### Ikki í Føroyum

Hvørja viku koma nýggir filmar í biografin í Føroyum. Av øllum teimum, sum ikki koma, er eina størst saknur í hesum. Ikki er hann heilt óaktuellur enn. Um jólini varð hann frumsýndur í New York. So kanska finnur hann vegin higar. Hin báðir fyrru "Fargo" og "The Big Lebowski" vórðu báðir sýndir herheima.

gult cyan magenta svart





*Nýggjársynski: Kanska ein spoli av Wenders?*

# The Million Dollar Hotel

## – Wim Wenders sigur søgu hjá Bono

*Meinhard Jensen*

Í fjør kom fløga út við tónleiki til filmin "Million Dollar Hotel". U2 eiga tríggjar nýggjar sangir og Bono tveir. Million Dollar Hotel er ikki eitt U2-prosjekt, men ein filmur, sum Bono hevur verið við til at gera søguna til. Aðrastaðni er hann liðugur at ganga. Kanska ein spoli verður sendur til Føroya.

### Søgan

Tað mesta av filminum fer fram á Million Dollar hotellinum. Íbúgvarnir eru fyri tað nógva sinnissjúk og taparar av ymsum slag. Izzy, ein ungur maður, sum er sonur ein jødiskan ríkmann, doyr, og ein FBI maður (Mel Gibson) kemur at kanna, hvussu og hvat er hent. Millum annað koma tey fram á nakrar málningar, sum Izzy sigst at skula hava málað. Eftirsum pápi Izzy er ríkur, fær sjónvarpið áhuga í honum, og málningarnir skulu tí framsýnast fyri almenninginum sum nakað heilt serligt. Soleiðis kunnu tey á hotellinum fáa sín lut í stjørnutilveruni.

Høvuðspersónurin, Tom Tom (Jeremy Davies), er ein av teimum mistonktu. Tom Tom er góður við Eloise, men hon trívist best einsamøll. Men tey koma at kennast so við og við, millum annað tí at FBI maðurin fær Eloise at brúka tíð saman við Tom Tom fyri at fáa upplýsingar burturúr honum.

### Tom Tom

Ofta tá tú finnur kjarnan í einum tingi, hevur tú mist so nógv annað burtur. Hinvegin kann ein kjarni eisini halda øllum øðrum saman. Tað ger Tom Tom í hesum filminum. Filmurin byrjar og endar við honum, og hinir persónarnir eiga sín part í søguni í mun til hansara. Skal eg gita, so haldi eg, at Tom Tom eigur sínar røtur í Tummillítla og kanska eisini Mysjkin fúrsta í bókini "Býttlingurin" hjá Dostojevskij. Dostojevskij royndi at skapa tann fullkomiliga góða persónin í Mysjkin og síðani fylgja honum til ytsta mark lívsins. Endin er, at sjálv góðskan er við til at gera hann til ein tragiskan persón. Menniskjan hevur ikki nóg mikið í sær sjálvari.

Dostojevskij ella ikki. Tom Tom er ein naivur og góður drongur, men hann hevur ikki skilt alt so væl. Hann trýr, at sjónvarpið er nakað, og hann letur seg tøla bæði av FBI manninum, Eloise, Izzy og indianaranum, sum letst at vera listamaður. Og tað er trupulleikin: kanska er hann ikki býttur, men bara góður. Kanska hevur hann sæð ígjøgnum øll, men velur alíkavæl at tæna teimum.

### Góður, sigandi filmur

Summi hava tann kritikkin, at tað hendir ikki so nógv í filminum, og at hann er so "snedigur." Filmurin er ikki sum allir aðrir filmar, og hann er ikki ein actionfilmur og heldur ikki ein komedia, men eg haldi, at hann er meira spennandi enn nógvir actionfilmar og absolutt stuttligari enn flestu komediur.

Millum annað er ein langhardur miðaldrandi maður við skeggi og rundum brillum og fínpussaðari Liverpool dialekt á hotellinum. Hann sigur seg hava skrivað tónleikin hjá Beatles, men eingin hevur nakrantíð trúð honum. Jeremy Davies er einastandandi sum Tom Tom. Tú gerst góður við hann, samstundis sum tað ber illa til at lata vera við at flenna at honum. Sum hann tosar og ber seg at er allan filmin vert.

Universið í filminum er fyri tað mesta hotellið. Stundum síggja vit gøtulívið uttanfyri, og vit fáa at vita um privatlívið hjá FBI manninum. Tey flestu, sum vitja hotellið, halda lítið annað um tey, sum búgva har, enn at tey eru svøk. Uttan tá tey gerast kend, tí kend fólk eru ikki svøk, men kend. Sambandið við útheimin er annars gjøgnum sjónvarp, og tað síggja tey nógv av.

Tað er ikki lætt at siga, um filmurin sigur, at allur heimurin er ein transitthøll fyri sinnissjúk fólk, sum leita eftir undirhaldi, einum vini og kanska eitt sindur av pengum og heiðuri. Ella um hann er um tey veiku í heiminum, sum royna at vera sum tey sterku. Men tað er nakað av hesum, haldi eg, hann er inni á.

### Leikstjórin

Wim Wenders hevur gjørt film síðan í 70árunum, og hann er millum annað kendur fyri filmin "Paris, Texas" frá 1984. Tey, sum kenna U2 væl, renna seg javnan inn í navn hansara. Hann skrivar ikki handrit sjálvur. Fyrr var tað ein annar høvundur, hann arbeiddi saman við. Nicholas Klein, sum nú skrivar handritini, hevur meira dialog og sigst at vera lættari at fata. Men sjálvandi eru mong, sum dáma betur gomlu filmarnar. Tey flestu munnu kenna filmin "City of Angels" við Nicolas Cage og Meg Ryan. Hann var gjørdur eftir filmunum "Himmalin yvir Berlin" og "Far Away, So Close" hjá Wim Wenders. "Buena Vista Social Club" frá Cuba er vorðin ein heimskendur tónleikabólkur, síðan Wim Wenders í fyrrárið leikstjórnaði filmin við sama navni.

Bono og Wim Wenders eru nær skyldir listarliga, hóast U2 er lættari fyri tey flestu at dáma. Báðir hava "heimin" við bíbilskari merking sum tema.

Í Far Away, So Close er tað eingilin, sum vil sleppa at vera menniskja og liva tímiliga og sansaliga lívið, men er um at missa sálina.

Í "Until the End of the World" er tað ferðin kring heimin at finna ting at síggja fyri ta blindu mammuna, sum síðani við hjálp av eini maskinu skal sleppa at síggja tað, sum onnur hava sæð fyri hana. Endin er, at maskinan kann fá dreymarnar á video, og soleiðis glatast øll í sínum egna dreymalívi. Hetta er eisini inni á tí, sum U2 hava gjørt nógv burturúr: sjónvarpið og menniskjað. Tankin er, at sjónvarpið og dagsins tankaleysu inntrykk allastaðni frá distancera okkum frá menniskjum og heiminum kring okkum - og ikki øvut. Hetta temað er við í Million Dollar Hotel.

### Til seinast

– Ikki tí at tað gevur filminum so nógv, men fyri summi kann tað vera stuttligt at síggja Bono í leiklutinum sum statistur á einum barrstóli. Filmar hjá Wim Wenders vórðu javnan vístir í Filmsfelagnum í 80'unum og Sjónvarpið hevur víst onkran.